## MIÐFLOKKURIN

hvørt vikuskifti í Sosialinum

- umsorgan
- tryggleiki
- trúfesti

**Miðflokkurin sjálvandi**



## Familjan er grundarlagið

Tá tú fert undir at byggja hús, er alneyðugt, at grundarlagið – fundamentið – er væl gjørt, soleiðis at húsini hvíla á tryggari grund. Um so húsini eru vælgjørd, snøgg og pen, nyttar hetta ikki nógv, um fundamentið ikki er trygt og væl gjørt.

Familjan er fundamentið undir okkara samfelag. Og Miðflokkurin ynskir at hetta grundarlagið skal vera so sunt og trygd, sum á nakran hátt gjørligt. Familjan er besti karmur um vælveruna hjá einstaklinginum, og flestu menniskju trívast ikki væl einsamøll.

Tí er greitt, at um samfelagið ansar eftir at familjan - mamman, pápin og børn- trívast og hava góð kor, so fær einstaklingurin tað gott, og tað smittar aftur yvir á arbeiðspláss, frítíðarítriv, mentanarlív og so framhaldandi.

Miðflokkurin hevur í verki sýnt, at vit vilja familjuni tað besta, og vilja føra politik á øllum økjum, ið gevur familjunum besta tilverugrundarlag.

## Visti tú, at:

- **flestu grannalond okkara stuðla barnafamiljum við m.a. ásettum hægstamarki fyri tí, ið ansingarstovnar kunnu loyva sær at taka í gjaldi ( í Svøríki max. góðar 2000 kr. um mðr.- uttan mun til tal av børnum).!**
- **flestu grannalond okkara stuðla barnafamiljum við at veita beinleiðis figgjarligan stuðul, sonevndar barnakekkar, øll barna- og ungdómsárini!**
- **í Føroyum, ið verður mett at hava hægsta føðitíttleika í Evropa, er einki hægstamark fyri ansingargjaldi- og heldur ikki verða barnakekkar veittir!**
- **at eitt av høvuðsmálum Miðflokksins er at lætta um hjá ungu familjum okkara, ið knógva undir alt ov tungum byrðum!**

www.midflokkurin.fo




Vikuskiftisvaktin hjá

# SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

## TELEFON 22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA